# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyskar røddir í Helsinki

Árligi fundurin í Norðurlandaráðnum verður hildin í Helsinki í hesum døgum. Hetta er fyrsti norðurlendski fundurin, har nýggja ABC samgongan fær gjørt vart við síni sjónarmið, og vit kunnu ikki annað enn frøðast um, at nýggi løgmaður okkara, enn einaferð undirstrikaði týdningin av einum sjálvstøðugum føroyskum limaskapi. Hann gjørdi týðuliga greitt í fyrsti røðu síni av hesum slag, at tað framvegis er málið hjá øllum føroyingum, at Føroyar fáa fullan limaskap í Norðurlandaráðnum. Løgmaður nam eisini við kreppuna, sum serliga hevur rakt Ísland so hart og gleddist um, at Norðurlond standa saman um at stuðla Íslandi í hesi torføru tíð.

Nýggi mentamálaráðharrin vardi eisini borg, tá hon fór á røðarasessin og uppá tað harðasta vísti aftur eini ætlan hjá embætismannabólki um at skerja ávirkanina hjá smærri tjóðunum í Norðurlandaráðnum í eini av nevndunum í ráðnum, Nordisk Sprogråd. Ætlanin er nevniliga, at eitt nú Føroyar skulu missa javnbjóðis limaskap í ráðnum og heldur fáa eygleiðarastøðu. Málið varð tikið av skránni, helst orsakað av atfinningunum frá føroyskari síðu. Vit standa eins og føroyski ráðharrin púra spyrjandi í hesum máli, tí tað kann ikki vera rætt, at stóru londini í Norðurlandaráðnum skulu taka aftur ein status, ið smærri tjóðirnar í Norðurlondum hava í hesum samanhangi. Tað at vit og eitt nú grønlendingar hava megnað at varðveita egin mál, tó at eru smátjóðir, er veruliga ein av styrkjunum hjá Norðurlondum. Tí er tað ein gáta fyri okkum, at annars siviliseraðu og mentaðu norðurlendsku tjóðirnar vilja flyta eitt nú Føroyar niður í lægri deild. Haldið tí fast her tit, sum umboða Føroyar á hesum stað.

Og enn ein føroysk rødd gav afturljóð á tí norðurlendska pallinum í Finlandi. Tað var tá forsetin í Útnorðurráðnum, Kári P Højgaard so rætt langaði út eftir Bretlandi, sum herfyri framdi skemdargerð móti Íslandi við at tvinna íslendsk áhugamál saman við Al Qaita og tað verri er. Kári P Højgaard helt fyri, at Bretland átti at tikið upp dialog við Ísland, áðrenn tað legði hald á íslendskan banka í Bretlandi.

Norðurlandaráðsfundurin kemur samtíðis, sum vit her heima av álvara hava sett hol á kjakið um framtíðar støðu okkara á tí europeiska meginlandinum. Vit kunnu taka fult og heilt undir við nýggja uttanríkisráðharranum, tá hann í vikuskiftinum segði, at Føroyar eiga ikki bert at hyggja inn á europeiska meginlandið, vit eiga eisini at hyggja longur út í heim. Tá hetta er sagt, so eigur sami ráðharri heldur ikki at avmarka innangarðs sjónarringin. Hóast EFTA limaskapur stendur á skránni, eiga vit eisini at kanna allar aðrar møguleikar, eitt nú limaskap ella hjálimaskap í ES. Tíðin er komin til at vit venda øllum, eisini teimum tabusteinum, har vit hava sett kikaran fyri tað blinda eygað. Heimurin stendur ikki í stað, og hesum mugu vit taka í álvara.

**Sosialurin**

## Útpurring Suðursteym!



**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri

Í hesum tíðum er stórur ágangur á Tórshavnar kommunu eftir inntøkujavning. Tíðir og umstøður skifta og inntøkuviðurskifti fylgja natúrliga við.

Búskaparráðið hevur fyrr í ár lagt fram frágreiðing um millumkommunala javning. Har sæst at Tórshavnar kommuna skal rinda 50 mió kr. til hinar kommunurnar.

Hetta svarar til áleið 2% av skattinum hjá borgarum í Tórshavnar kommunu. Skal hetta koma uppá tal skal slakast í tænastuveitingum og ætlaðum íløgum. Hetta kemur at útskjóta ætlaða bygging av ellisheimi, musikkskúla, fólkaskúlum, vegum og kloakkum o.ø.

Framburðurin og trivnaðurin í Tórshavnar kommunu skal svíða fyri at pengurin verður fluttar aðrastaðni. Hetta merkir í roynd og veru at Tórshavnar kommuna og borgarar tess fáa ein eykaskatt á 2%.

Feløg og stovnar, sum Føroya Banki, Eik, tryggingarfeløgini, Statoil og Shell, ið skapa landsfevnandi inntøkur, hóast høvuðssætið er í Havn, verða inntøkujavnað út um alt landið. Sama kann ikki sigast um eitt nú Havsbrún, fiskavirkir, útgerðarfeløg o. o., hóast vit øll eiga landgrunnin.

Um matfeingið – naturaliubúskapurin – uttanfyri Tórshavnar kommunu framhaldandi skal ganga fríur og enntá haldast upp móti tænastustøðinum í høvðusstaðarkommununi, har fólk eru noydd til at keypa alt, ja so verður torført at halda politiskar ætlanir og leggja karmar um ætlaðar íløgur.

Er tað hetta, ið landspolitikarar vilja? Hvat sigur vinnulívið? Og hvat sigur borgarin í Tórshavnar kommunu? Eg vil ikki hetta.

Eg vil steðga hesari ábyrgdarleysu tilgongd.

Tá landið fer at leggja lógarbundnar uppgávur sum skúlar og eldraøkið til kommunurnar at umsita og pengar fylgja við, eri eg fyri millumkommunalari javning av hesum pengum, men eg eri ikki fyri javning í verandi kommunubúskapi, sum vit hava haft ábyrgd av í meira enn hundað ár.

Við tínari atkvøðu haldi eg kósina.

## Grundstykkir í kommununi er sum ein býur í Kina



**STEINFINNUR MITTELSTEIN**
Valevni
Sambandsfloksins

**Nógv hevur verið tosað um bíðilistan til grundstykkir í Tórshavnar kommunu, men staðfestast má, at hann er alt alt ov langur**

Hann er onki styttur, tí sitandi býráðssamgonga hevur ikki raðfest grundstykkir til okkara ungu, og tey sum ynskja at flyta heimaftur.

Eftir at bíðilistin gjørdist elektroniskur, er tað hent, at tey sum hyggja inn á listan, fyri at vita hvar tey standa á bíðilistanum, missa fullkomuliga móti, tí hann gerst bara longri og longri – uml. 1800 í løtuni.

Tað einasta hendan samgongan hevur gjørt, er, at bjóða ungum familjum 200 fermetrar grundstykki fyri omanfyri hálva milljón. Tískil stendur ein stór íløga uppi í Hoyvíkshaganum, ið ongin skoytir um.

Vit muga aftur til tað borgarin ynskir. Útstykkingar, har kommunan stykkjar út, ger veg og kloakk og bjóðar familjunum stykkir, ið eru 500 fermetrar. Tað er tað sum tað er mangul uppá, og tað er tað sum borgarin ynskir. At smoyggja útlendskar byggiloysnir yvir fólk skapar ikki áhugan at seta búgv í kommununi.

Hettar hevur ligið á láni, og vil eg arbeiða fyri, at grundstykkir aftur fáa høga raðfesting til okkara ungu familjur, ið ynskja at seta búgv í kommununi.

Góði borgari, við eini atkvøðu til lista B, tryggja vit "handling bag ord".

### Gjald fyri valgreinar

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

### Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.